# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hotel Streym:

## Nýtt hotell í høvuðsstaðnum




*Jens Tummas Næss, leiðari á Hotel Streym yviri við Strond*

**Mikudagin 7. juni var móttøka á nýggja hotellinum, Hotel Streym, yviri við Strond í Havn. Bygningurin er upprunaliga ein skrivstovubygningur, ið varð keyptur síðst í 2005 og er síðan bygdur um til hotell**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kritsian Vang*

Hotel Streym eitur nýggjasta hotellið í høvuðsstaðnum. Talan er um eitt stásilig og nýinnrættað hotell við 14 rúmum og 26 seingjaplássum.

Øll hotellrúmini hava sjónvarp, telefon, internet við breiðbandi, wc og bað.

Dagligi leiðarin á Hotel Streym, Jens Tummas Næss, sigur, at ferðavinnan er næststørsta vinna í Føroyum og er í stórum vøkstri. Hotellið hevur longu fingið nógvar bíleggingar, áðrenn vit lata upp fríggjadagin 9. juni.

Hotellið er avgjørt kappingarført í prísi og fasilitetirnir eru á sera høgum støði.

Við í prísinum fyri gisting er eisini morgunmatur. Hotellið liggur eisini væl fyri í býnum, sigur Jens Tummas Næss.



*Maria Ellefsen Næss og vermóðurin Margretha Næss*



*Svend Åge Ellefsen við eini abbadóttir*



*Hotellið hevur 14 rúm og 26 seingjaplássum. Øll hotellrúmini hava sjónvarp, telefon, internet við breiðbandi, wc og bað*

† 

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kjúrtin Borðoy** fer úr Christianskirkjuni í Klaksvík leygardagin kl. 13.30. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Øssur Viberg Mortensen** fer til gravar leygardagin 10. juni, kl. 13.30 úr Tvøroyrar kirkju.

**Hilda Christiansen, Klaksvík**, andaðist í heiminum mikudagin 7. juni, 72 ár. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Gunnar Guttesen** fer úr Landssjúkrahúskapellinum heim í Ebenezer fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.

Kistan við **Meinhard Augustinussen** fer av kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsið fríggjadagin 9. juni kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vágs Kirkju leygardagin kl. 13.

Kistan við **Mariu Vang** fer av kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 8. juni kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju fríggjadagin kl. 13.

**Mogens Rasmussen**, ættaður av **Skála**, búsitandi í **Thyborøn** í Danmark, andaðist 3 juni 61 ára gamal. Jarðarferðin var úr Thyborøn kirkju.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi

**Øssur Viberg Mortensen**

andaðist 1. juni í Keypmannahavn, 58 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin 10. juni kl. 13.30. Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunnar vegna*
**Laila og Cecilia**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verfaðir, og abbi okkara

**Gunnar Guttesen**

Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 6. juni, 68 ára gomal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum heim í Ebenezer fríggjadagin 9. juni kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin 10. juni kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Ragnfríð og børnini**

Tey, sum vilja minnast Gunnar, kunnu lata eina peningagávu til Akurin. Konta í peningastovnunum